Stjørnan-VB 15-20 (10-10):

# Silvurdysturin víðopin

**Stjærnan mátti á heimavølli taka til takkar við greiðum tapi móti VB, og nú er spenningurin um silvurmerkini í kvinnudeildini størri, hann nakran tíð hevur verið í vetur**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Alt kappingarárið í vetur hevur tað verið soleiðis, at spenningurin fyri tað mesta hevur gingið fyri seg í botninum. Gullmerkini hava alla tíðina ligið til at fara til Vestmanna, meðan tað hevur tókst eins sannlíkt, at silvurmerkini skuldu fara til Klaksvíkar, har Stjørnan hevur vundið burtur úr øllum øðrum enn júst VÍF.

Sunnudagin varð hendan myndin tó koppað á høvdið, tá VB, sum annars eisini basti Stjørnuni í grundspælinum, var á vitjan í Klaksvík.

Undan dystinum var greitt, at Stjørnan í hvussu so er var skerd, tí Adrijana Milodanovic meiddi sær knæðið í steypafinaluni. Møguliga er skaðin hjá Adrijanu somikið álvarsligur, at hon als ikki spælir aftur í ár, men hetta er so enn ikki avklárað.

Hin útlendski stórspælarin, Simona Dziugyte, sum annars hevur verið stóra álitið í málskjótingini, fekk eisini ein snudd í steypafinaluni. Talan var um ein gamlan skaða, sum versnaði ta ferðina, og hesa ferð var hon so ikki millum tær fyrstu á vøllinum, tó at hon var við í hópinum.

Sum skilst á lagnum, so darvaði fráveran av útlendsku leikarunum Stjørnuni rættiliga nógv í spælinum. Hópur av bóltum vórðu tveittir burtur, og tá spælið hjá VB heldur ikki var av tí besta, so gjørdist talan ongan tíð um tað heilt stóra hondbóltsupplivilsi.

Spenningur var tó um úrslitið megin partin av tíðini. Í fyrra hálvleiki var tað Stjørnan, sum hevði munin størsta partin av tíðini. Ein minutt fyri hálvleik vóru tær eisini á odda við tveimum málum, men tær megnaðu ikki at halda, og ístaðin kundi VB við tveimum kontramálum vinna seg upp á javnt.

Í seinna hótti Stjørnan alt fyri eitt at toga seg leysa, men so kom stíðjur í. Fyrst skutu tær einki mál í tíggju minuttir, so VB kom tvey mál framum. Síðani javnaði heimaliði við tveimum skjótum málum, men so var eisini liðugt. Ikki tí. Stjørnan hevði møguleikan, men tær misnýttu ikki færri enn fimm brotskøst á rað, meðan VB hinvegin skoraði fimm ferðir, og so gjørdist talan hóast alt um ein í tølum sera sannførandi sigur.



*Hóast VB ikki hevði ein av sínum bestu døgum, so eydnaðist tað kortini at vinna torføra útidystin í Klaksvík, og nú er dysturin um silvurið púrasta opin*

*Mynd: SjH*

### Silvurdysturin

Tapið hjá Stjørnuni hevur við sær, at hóast stríðið um gullið langt síðani er avgjørt, so er spenningurin um silvurmerkini nú størri enn nakran tíð. Har er Stjørnan í løtuni á odda. Tær hava betri málmun enn VB og ein dyst færri, meðan Neistin á fjórða plássinum er tvey stig aftan fyri hini bæði.

Hetta kann tó skjótt skifta. Longu týsdagin skal Stjørnan til Vestmanna, og tá er mest sum sjálvsagt, at fyrimunurin í dystartalinum verður javnaður, uttan at Stjørnan fær nakað aftúrfyri, og so er líkt til, at tað brádliga er Neistin, sum stendur við bestu kortunum í hesum stríðnum. Tær hava nevnliga heimadystir móti bæði Stjørnuni og VB til góðar, og megna tær at vinna hesar, samstundis sum tær fáa fulla úrtøku móti lægru støddu liðunum, so er einki at ivast í, at silvurið fer til teirra í ár. Einasta treytin er tá, at VÍF vinnur dystirnar móti VB og Stjørnuni, og tað skal vera løgið, um hendan treytin ikki verður uppfylt.

### Dysturin í tølum
**Stjørnan-VB 15-20 (10-10)**

Málskjúttar:
Stjørnan: Anna Kristina Samson 7, Joan M. Joensen 4(3), Beinta Klakstein 1, Simona Dziugyte 1, Bára Skaale 1, Una Olsen 1
VB: Gurið Mortensen 7, Regina Radó 4, Eyðbritt Krosslá 2, Margreth Augustinussen 2, Laila Jespersen 2, Sólrun Krosslá 2, Gabriella Fekete 1(1)
Brotskøst: Stjørnan 8, VB 2
Útvísingar: VB 2
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen & Kristian Johansen.

# Ættarliðsskiftið verður eingin katastrofa

**Nýggju landsliðsmenninir hava so mikið nógvar altjóða royndir, at teir eru ikki fjáltursstungnir, men tora at spæla fótbólt, tá teir fáa møguleikan**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið roknað við tí, og tað er ikki so undarligt. Allan Simonsen hevði ábyrgdina av landsliðnum í átta ár, og hann hevði sínar álitismenn. Millum teirra vóru Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen, Øssur Hansen, Hans Fróði Hansen, Julian Johnsson, Allan Mørkøre, Jákup Mikkelsen og Fróði Benjaminsen.

Eingin av hesum er í landsliðshópinum, sum í hesum døgum er á Kypros. Jens Kristian Hansen, Hans Fróði Hansen og Øssur Hansen góvu avboð, tí teir vóru upptiknir av arbeiði. Fróði Benjaminsen og Allan Mørkøre vóru upptiknir av skúla, meðan Óli Johannesen, Jákup Mikkelsen og Julian Johnsson eru so mikið upptikinir í útlendsku feløgunum, at teir ikki hava stundir at vera saman við landsliðsfeløgunum.

Eingin orsøk er at rokna við, at teir, sum vinna pengar við at spæla fótbólt uttanlands, ikki fara at spæla á landsliðnum, tá undankappingar dystirnir fara at tørna fyri. Spurningurin er meiri, hvussu tað verður við teimum, ið ikki hava stundir at fara úr arbeiði og á venjingarlegu. Tað er altíð ein spurningur um raðfesting, og tað er nátúrligt, at raðfestingin broytist, sum árini fara, og ábyrgdin í familjulívinum og arbeiðnum gerst størri.

### Himprast ikki

Hóast tað kanska ikki verður so leingi, inntil onkrir fara at gevast, so vísir tað seg, at nýggir spælarar standa klárir at taka við. Og teir eru ivaleyst betri fyrireikaðir, enn veteranarnir, sum sendu avboð til venjingarleguna, vóru, tá teir komu á landsliðið. Ungu menninir hava spælt nógv á yngru landsliðunum. Her verður hugsað um Klæmint Matras, Jón Róa Jacobsen, Hjalgrím Elttør, Rógva Jacobsen, Jákup á Borg, Christian Høgna Jacobsen, Meinhard Joensen og Andrew av Fløtum. Undantakið er evnaríki Palli Augustinussen úr VB, sum ongantíð hevur verið á yngru landsliðunum. Øllum hinum, sum her eru nevndir, hevur Jógvan Martin Olsen verið venjari hjá:

– Hetta eru alt spælarar, sum á yngru landsliðunum hava lært at halda høvdið kalt og at spæla og ikki sparka, tá teir í altjóða dystum eru undir trýsti. Undan dystinum ímóti Póllandi ivaðust vit í, um vit skuldu nýta Bartal Eliasen ella Jón Róa Jacobsen í miðverjuni. Vit valdu Bartal, tí vit vildu gardera okkum í høvuðspælinum. Í 2. hálvleiki skiftu vit út, tí Bartal hevði fingið ein lítlan snudd. Jón Rói Jacobsen kom í miðverjuna. Tað var eingin fjáltur á honum. Hann hevur á U–19 landsliðnum spælt ímóti eitt nú Italia, og tað ber góða barlast við sær, heldur Jógvan Martin Olsen, sum eisini vísir á, at umframt allir teir ungu menninar, ið eru á Kypros, so skal eisini roknast við Súna Olsen.

– Tað er hugaligt at staðfesta, at tað verður nógv troðkan fyri at sleppa upp í part, tá farið verður undir EM undankappingina.



Neistin-StÍF 29-31 (13-16):

# StÍF avgjørdi gullið



*StÍF vann aðru ferð upp í slag á Neistanum. Gullmerkini fara nú mest sum fyri víst til Vestmanna, og í veruleikanum skulu neistamenn helst hugsa meira um at halda fast um silvurmerkini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Strandingar endurtóku finalusigurin á Neistanum, og hóast tað ikki var sami nervi í dystinum hesaferð, so var sigurin ikki minni uppiborin av teirri orsøk**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Uttan at spæla tóku vestmenningar eitt rimmar fet móti meistaraheitinum, tá Neistin annan dystin á rað var við undirlutan móti strandingum.

Treytirnar hjá Neistanum hava nevnliga verið púrasta greiðar, síðani teir taptu fyrra dystin móti VÍF í endaspælinum. Skuldi hugsingur vera um at vinna gullmerkini, skuldu allir eftirverandi dystirnir vinnast, samstundis sum álit skuldi setast á, at vestmenningar fóru at snáva móti øðrum enn Neistanum.

### Hugburðurin var hin rætti

Fyrstu av hesum treytunum misrøktu teir tó, tá StÍF kom á vitjan sunnudagin. Talan var um eina endurtøku av steypafinaluni, sum varð leikt fyri viku síðani. Ta ferðina tapti Neistin, og tí var kanska væntandi, at teir bláu fóru sum úlvar á skóg út til dystin, meðan tað hinvegin eisini var hugsandi, at strandingar vóru mest sum nøgdir um steypasigurin, og tí ikki megnaðu at stríðast eins væl tað, sum eftir er av árinum.

Tað var tó hampuliga skjótt greitt, at hvat viðvíkti hugburðinum til dystin, so stóð StÍF einki aftan fyri Neistan, og somuleiðis var skjótt greitt, at hetta als ikki fór at gerast nøkur løtt uppgáva hjá Neistanum.

Strandingar hildu nevnliga á fram, sum um miðvikudystiruin móti Kyndli als ikki hevði verið til, og sum um hetta bara var framhald av steypafinaluni. Við kvikum álopsspæli komu teir ferð eftir ferð inn um neistaverjuna, har Petur Magnusson var mest sum seldur fleiri ferðir upp í slag, og í verjupartinum megnaðu teir sera væl at skerma fyri vandamiklu skjúttunum hjá Neistanum, og á tann hátt hjálpa tí annars væl spælandi Marian Cirloganescu í málinum.

At spælið hjá Neistanum í stóran mun hekk á skjúttunum, var eisini ein avleiðing av, at John Petersen í løtuni er á Cypros við fótbóltslandsliðnum. Hetta noyddi Hans Áka Dal-Christiansen í ein permanentan leiklut sum vongur, og hóast hann helst er millum stinnastu føroysku leikararnar á hesum plássinum, so viðførdi tað samstundis, at nógv minni bit enn vanligt var í strikuspælinum hjá Neistanum.

### Útvísingar kostaðu

Tað gekk soleiðis javnt á størsta partin av fyrra hálvleiki, men spakuliga hómaðist tó, at strandingar kanska høvdu eina lítla yvirvág. Tað gekk líka sum meira ómaksleyst hjá teimum at koma fram til málmøguleikarnar, og tó at Jacob Jónsson togaði sín part heim við onkrari detalju í flokki langt omanfyri tann føroyska, so gekk meira striltið hjá Neistanum.

Í seinna hálvleiki var heilt skjótt, at StÍF veruliga fór at draga, og størsta orsøkin til hetta var, at teir í nógv størri mun dugdu at gera sær dælt av yvirtalsstøðum. Fyrst gjørdu teir sær fulla nyttu av, at Petur Magnusson noyddist út í tveir minuttir, og tá strandamálverjin stutt eftir fekk somu lagnu, tóktist hetta ikki at bila teimum nakað. Heldur enn at StÍF nú skuldi royna seg í undirtali í tveir minuttir, framdi Neistin tvey mistøku á rað, so teir nú bert vóru fýra á vøllinum, og aftur nýttu strandingar høvið til at draga meira. Ikki kann sigast annað enn, at hetta var sera órutinerað av Neistanum, og sum dysturin leið, so kann mest sum eisini staðfestast, at hetta kostaði teimum dystin – og kanska gullmøguleikan.

Tað var nevnliga soleiðis, at stutt eftir hetta, so fór Neistin veruliga at gera um seg. Eftir at strandingar høvdu økt munin upp í 26-19, og alt tóktist avgjørt, fór brádliga at ganga skjótt fyri seg. Fýra mál á rað minkaðu heilt fitt um munin, og tá at strandingar royndu at svara aftur, so tóktist hetta vera sera torført. Ikki minst eftir at teir misnýttu tvey brotskøst á rað.

Men, strandingar hava sum kunnugt Svein Justinussen á liðnum, og eins og hann gjørdi tað í steypafinaluni, so var hann aftur hesa ferð maðurin, sum tipti Neistan, tá hann økti munin upp í trý mál bert fýra minuttir fyri leiklok. Neistin royndi aftur at svara, men tað eydnaðist teimum ikki at koma nóg nær. Ein minutt fyri leiklok minkaði munurin í tvey mál, men tá kundu strandingar so bara geva sær góðar stundir, og tó at Neistin fekk enn ein møguleika, so var tað greitt. Aðru ferð innan eina viku høvdu strandingar bast Neistanum í egnari holu.

### Mugu verja silvurið

Spurningurin er so bara, um Neistin við hesum ikki misti seinasta møguleikan at vinna VÍF aftur. Sum støðan er nú, so eru trý stig upp til VÍF, og tá hevur Neistin eisini leikt ein dyst færri enn oddaliðið. Sum gongdin hevur verið, so tykist spurningurin heldur at vera, um Neistin fer at halda fast um silvurmerkini. Strandingar hava nú fýra stig færri enn Neistin, og enn hevur Neistin útidystir móti bæði VÍF og StÍF, meðan StÍF longu hevur verið í Vestmanna, so skal nakar spenningur finnast, tað sum eftir er av árinum, so er tað heldur í silvur- og enn gulldystinum.

### Dysturin í tølum
**Neistin-StÍF 29-31 (13-16):**

Málskjúttar:
Neistin: Jacob Jónsson 8, Heini Joensen 7(3), Ári Rouch 4, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Helgi Justinussen 2, Áki Mørk 2, Ragnar Stakksund 1, Kári Mortensen 1, Ræni Slættanes 1
StÍF: Artur Johansen 8(4), Alexandur Johansen 5, Costin Dumitrescu 4(1), Andre F. Danielsen 4, Jón Rasmussen 3, Sveinur Justinussen 3, Marius Joensen 3, Janus Trygvason 1
Brotskøst: Neistin 5, StÍF 9
Útvísingar: Neistin 7, StÍF 5
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum. Komu sera væl frá dystinum, sum teir stýrdu við sjálvsøgdum myndugleika.

Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær, bæði til gaman og álvara. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu frálíku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum.

Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

**Íroknað er** flogferð, fýra nætur á dupultkamari við morgunmati og ferðaavgjøld.
Tilboðið er galdandi til 1. apríl.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 19.00.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo